







# Musikkskúlastevnan 2001

**Aftur í ár var musikkskúlastevnan hildin, tó nærum eitt hálvt ár seinni enn fyrst ætlað. -Tað eydnaðist avbera væl, betri enn vit høvdu forvæntað- , sigur ein væl nøgdur Martin Mouritsen**

TÓNLEIKASTEVNA
*Jón Festirstein Andreasen*

Í døgunum 7 - 9 sept. var musikkskúlastevnan aftur á skránni. Stevnan var útsett nærum eitt hálvt ár, orsakað av verkfallinum fyrri í ár. Á stevnuni luttóku 250 næmingar úr musikkskúlum kring landið. Næmingarnir vóru skipaðir í ymisk orkestur, og aftaná tveir dagar við venjingum, endaði stevnan sunnudagin við einari konsert í Norðurlandahúsinum, har ið øll spældu við.

Í ár varð musikkskúlastevnan skipað eitt sindur øðrvísi enn í teimum fyrru árunum. Mann hevði valt at býta stevnuna í fleiri partar, alt eftir ljóðføri. Tann stevnan, ið var herfyri, var bert fyri strúkarar og blásarar. Orsøkin til hetta var, at á teimum fyrru musikkskúlastevnunum, har í øll ljóðføri luttóku, vóru alt ov ringar at halda skil á. Pláss var eiheldur fyri øllum foreldrunum, ið vóru komin at lurta eftir teirra barni á konsertinum. Av trygdarávum bleiv luttakaratalið avmarkað fyri at eftirlíka trygdartiltøk. Fyrra árið, tá ið øll ljóðføri luttóku, var luttakaratalið yvir 400.

**Mennir áhugan**

Tað er Føroya Musikkskúlaskipan ið skipar fyri stevnunar. Endamálið við einari tílíkari stevnu er at geva næmingum høvi til at spæla í bólkum og at menna áhugan hjá børnum at halda áfram við at spæla tónleik.

Tá ið musikkskúlastevnan byrjaði fyri 16 árum síðani, var endamálið at geva næmingum høvi til at hoyra onnur ljóðføri enn teirra egna, men tað var ov strævið at fyriskipa við, og nú fokuserar man á ljóðføri hjá næminginum, sigur Martin Mouritsen.

Musikkskúlastevnur eru ikki um eitt serføroyskt tiltak. Eitt nú í Skotlandi skipar mann fyri líknandi stevnu hvønn mánað.

Martin Mouritsen hevði kunna hugsað sær at skipa fyri enn størri orkestur, tó skal talið á luttakarum ikki yvir hundrað, tí royndir vísa, at tað er ov ringt at halda skil á so mongum børnum.

Á seinastu stevnu vóru sjey ymisk orkestur, ið vóru mannaði av 250 børn og ung frá 7 - 20 ár, so tað kann sigast, at undirtøkan hevur verið heilt góð.

# Letur barnagarð upp til várs

*Akutti tørvurin á stovnsplássum er ivaleyst størri enn kanningin vísir, sigur Jóannis Erik Køtlum, sjúkrahússtjóri*



**Arbeitt verður við eini ítøkiligari ætlan um at gera barnagarð til børn hjá starvsfólki á Landssjúkrahúsinum**

BARNAGARÐUR
*Turið Kjølbro*

Gongst eftir vild letur Landssjúkrahúsið ein barnagarð upp tíðliga í komandi ári. Fyrst í hesum árinum gjørdi Landssjúkrahúsið eina kanning millum starvsfólkini á stovninum um, hvussu nógv teirra tørvar stovnspláss til børn teirra. Úrslitið av kanningini, sum 250 starvsfólk svaraðu uppá, vísir, at í minsta lagi 30 teirra hava tørv á stovnsplássi her og nú.

- Akutti tørvurin er ivaleyst størri, tí kanningin sigur einki um tey, sum høvdu tikið av starvi á Landssjúkrahúsinum, um tey fingu børnini ansað, eitt nú starvsfólk sum koma aðrastaðni frá, sigur Jóannis Erik Køtlum, sjúkrahússtjóri.

Kanningin vísir eisini, at eini 60 foreldur høvdu tikið børn síni úr stovninum, tey brúka í løtuni, um Landssjúkrahúsið skipar ein stovn, ið hevur opið alt døgnið. Landssjúkrahúsið hevur møguleika at seta reglur fyri, hvussu nógv pláss stovnurin vil hava standandi tøk, til eitt nú starvsfólk, sum koma úr øðrum londum at arbeiða á Landssjúkrahúsinum styttri og longri tíðarskeið.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum arbeiðir í løtuni við ymiskum loysnum, soleiðis at ein barnagarður verður veruleiki nakað skjótt. Ein hóskandi bygningur er inni í myndini. Hendan eigur Almanna- og heilsumálastýrið, men sjúkrahússtjórin vil ikki upplýsa, hvør bygningur er talan um, fyrr enn ymisk viðurskifti eru fingin uppá pláss. Tórshavnar kommunu hevur kannað bygningin og góðkent hann til barnagarð. Mett verður, at tað fer at kosta umleið 1,7 mió. krónur at byggja hann um til barnagarð, og verður hendan upphæddin játtað á næstu eykajáttan, sum kemur fyri tingið í oktober, verður farið til verka beinanvegin.

- Umbyggingin fer helst at taka einar fýra mánaðir frá tí pengarnir eru játtaðir, sigur Jóannis Erik Køtlum.

Landssjúkrahúsið rindar 80 prosent av íløguni í stovnin meðan Tórshavnar býráð rindar 20 prosent. Raksturin rinda kommunan og foreldrini í felag.


Konfirmatión, heystið 2001

**Halt konfirmatiónina heima - matin fært tú úr Perluni.** Ynskir tú at halda eina góða konfirmatión fyri barni tínum, so ber tað væl til at halda hana alla heima, uttan tær nýtist at hugsa alt ov nógv um matin. Heimið er tað staðið, har hugnin hoyrir heima. Tú ringir bara til Perluna og bíleggur eftir hesi matskrá - og tú hevur spart tær nógv strið og pengar.

**FORRÆTTIR**
**Aspargessuppa** við heimabakaðum breyði
**Klár suppa** við kjøt- og mjølbollum og flute
**Rækjubland** við flute og smøri

**HØVUÐSRÆTTIR**
**Lambasteik** við rómastúvaðum eplum, salati og sós av soðnum
**Heilstokt oksaháryggur** við grønmeti, agurkusalati, súltutoyi, hvítum eplum og brúnari sós
**Heilstokt oksaháryggur** við rómastúvaðum eplum, salati og reyðvínssós
**Lambasteik** við reyðkáli, agurkusalati, súltutoyi, hvítum og brúnkaðum eplum og sós

**OMANÁ**
**Íslagkøka** við vaflum
**Frísk fruktsalat** v/rákremi
**Heimagjørd triffli**

Perlan TEL 31 50 61

**PRÍSIR:**
Høvuðsrættur..... 100,-
2 rættir... 120,-
3 rættir... 140,-

**Levering bert í Suðurstreymoy!**